# Ein skandala sum útlendingar í Føroyum verða viðfarnir

**Útlendingapolitikkurin hjá samgonguni er ein skandala. Men tað er ein skandala, sum samgongan sjálv hevur skapt, tí vit ávaraðu ímóti hesum, sigur Høgni Hoydal, sum umsat útlendingamál í undanfarnu samgongu**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Natasha Vukotic og dóttir hennara í Hvalba eru tvey syndarlig dømi um útlendingar í Føroyum, sum druknað í tí ruðulleikakenda útlendingapolitikkinum hjá landsstýrinum, sigur Høgni Hoydal*

– Tað er ein skandala, soleiðis sum útlendingar í Føroyum verða viðfarnir.

Tað heldur Høgni Hoydal, løgtings- og fólkatingsmaður.

Tað var eisini hann, sum umsat útlendingamál í undanfarna landsstýrið.

Hann leggur afturat, at hetta er ein skandala, sum samgongan sjálv hevur skapt og sum alt landsstýrið má bera ábyrgdina av.

– Men tað allarringasta er, at hetta er ein skandala, sum sum vit kundu sloppið undan, tí tjóðveldisflokkurin hevur alla tíðina ávarað júst ímóti hesi støðuni, sum nú er íkomin.

Høgni Hoydal sigur, at tá ið hann umsat útlendingapolitikkin í landsstýrinum, gjørdi hann eina avtalu við donsku stjórnina um, hvussu útlendingapolitikkurin skuldi skipast, samstundis sum viðgerðartíðin varð stytt niður í tríggjar ella fýra vikur.

– Ein partur av avtaluni var at geva ítróttarfólki eina smidliga skipan og ein annar partur var, hvussu farast skuldi fram ímóti ólógligari, útlendskari arbeiðsmegi.

Men samgongan slitnaði beint áðrenn avtalan varð undirskrivað.

– Endamálið var at útlendingamálið skuldi yvirtakast. Men samgongan, sum nú situr, hevur altso ikki viljað yvirtikið útlendingamál. Samstundias hevur hon vavt allan útlendingapolitikkin upp í ein ellubita.

## Gera útlendingar til ein trupulleika

Høgni Hoydal sigur, at hann sær bara eina orsøk til tann útlendingapolitikk, sum hendan samgongan førir og tað er, at fólkaflokkurin hevur í valstríðnum til løgtingsvalið og fólkatingsvalið gjørt útlendingamálið til ein trupulleika.

Hann sigur, at ein orsøk til ruðulleikan er, at samgongan royndi at seta Jógvan við Keldu upp á pláss við at kunngerða, at hereftir skuldi politikkurin vera, at teir útlendingar, sum vóru í Føroyum, skuldi sleppa at verða verandi, men at tey, sum ætlaðu at koma fyrstu fer, mugu bíða, til greiðar reglar eru gjørdar.

– Hetta hevur skapt ómetaligar trupulleikar, tí nú fær embætisverkið í innlendismálaráðnum, hjá løgregluni og hjá útlændingestyrelsen ongar sakligar fortreytir at viðgera umsóknirnar eftir. Úrslitið er, at útlendingar í Føroyum verða ikki viðgjørdir eins og tí er tað ein vónleys uppgáva hjá embætisfólkunum. Sakliga kunnu embætisfólk ikki viðgera summar umsóknir og ikki aðrar.

– Avleiðingin er at rættartrygdin er fullkomiliga sett til viks, tí grundarlagið undir rættartrygdini er, at øll verða viðgjørd eins. Samstundis er avgreiðslutíðin farin at taka mánaðir og ár.

## Eitt syndarligt dømi

Høgni Hoydal sigur, at sum fólkatingsmaður hevur hann hjálpt einum 30 útlendingum at fáa gongd á málini.

– Men júst tað at tað skal vera neyðugt hjá einstøkum politikarum at taka málini upp,vísir hvussu illa tað er statt við rættartrygdini á økinum, tí tað kann ikki vera meiningin, at bara tey, sum kenna onkran, kunnu fáa málini avgreidd.

– Men orsøkin er, at samgongan hevur skapt slíkan ruðulleika á økinum, at øll málsviðgerð er at kalla steðgað.

Ein trupulleiki við útlendingamálinum er, at tað eru so nógvir myndugleikar uppií, bæði Landsstýrið, løgreglan og útlændingestyrelsen.

Tí mælir Høgni Hoydal enn einaferð til at útlendingamálið verður yvirtikið á føroyskar hendur ongantíð ov skjótt, so at vit fáa eina greiða skipan.

Sjálvur heldur Høgni Hoydal, at málið um Natashu Vukotic í Hvalba, sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár, er eitt syndarligt dømi um tann ruðulleika sum valdar í útlendingapolitikkinum hjá samgonguni.

– Onnur lond hava trupulleikar av flóttafólki og av stórum bólkum av útlendingum, sum hvørki hava arbeiði og sum savnast í eina getto, uttan at verða integrerað. Teir trupulleikarnar hava vit ikki í Føroyum. Útlendingarnir í Føroyum, skulu hava arbeiði og íbúð og so har tær treytirnar eru lúkaðar, hava vit bara dømi um væleyndaða integratión í samfelagnum.

– Fyrsta treytin fyri at sleppa undan trupulleikum, er at hava púra greiðar reglur á økinum.

Sjálvur heldur Høgni Hoydal at tað er púra burturvið at senda fólk sum Rapa-hjúnini og Natasha Vukotic í Hvalba landinum, so leingi tey ikki bróta lógina, men lúka treytir.

# Kunnu ikki liva við at útlendingar verða soleiðis viðfarnir í Føroyum

**John Johannessen, tingmaður úr samgonguni, hevur ikki álit á útlendingapolitikkinum hjá landsstýrinum**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg havi ikki álit á útlendingapolitikkinum hjá samgonguni.

Tað sigur John Johannessen, tingmaður fyri javnaðarflokkin og sostatt eisini tingmaður fyri samgonguna.

Hesi seinastu tíðina hevur eitt stríðsmál fyri og annað eftir verið frammi um, hvussu útlendingar verða viðfarnir av Landsstýrinum.

Seinasta málið var í Sosialinum í gjár, har vit fortaldu søguna um jugoslavan, Natashu Vucotic, sum býr í Hvalba og sum nú hevur bíðað í eitt heilt ár eftir svari úr Innlendismálaráðnum upp á eina umsókn um at fáa arbeiðsloyvið longt.

John Johannessen er ein av teimum tingfólkum, sum hava gjørt mest vart við seg seinastu tíðina í sambandi við útlendingamálini og vit hava spurt hann, um hann góðtekur tað viðferð, sum úytlendingar fáa frá landsstýrinum.

Tað ger hann ikki og hann sigur, at nú má samgongan av álvara taka málið upp til fyri at fáa greiði á, hvat tað er, sum hendir á útlendingapolitikkinum, tí hann hevur ikki álit á tí, sum fer fram.

– Útlendingamál hava javnan elvt til stríð og sum støðan er nú, havi eg ikki álit á, at tann útlendingapolitikkurin, sum verður førdur í løtuni, er ein politikkur, sum samgongan er samd um.

Tí heldur hann at tað hevur sera stóran týdning, at samgongan tekur málið til viðgerð av álvara fyri at fáa greiði, hvønn útlendingapolitikk, vit skulu hava í hesum landi.

Umisitingin í innlendismálaráðnum førir fram, at ein orsøk til at tað gongur so seint at viðgerða umsóknir frá útlendingum, er, at miðfyrisitingin varð so nógv skerd fyri hálvum øðrum ári síðani og at tey tískil ikki hava arbeiðsorku til at avgreiða málini skjótari. Er tað so ikki tykkara egna skyld í samgonguni, at tað gongur so seint?

– Eg haldi ikki, at fyrisitingin er so nógv skerd, at fólk ikki kunnu fáa svar, so at tey vita, hvar tey flóta. Eg ivist í um tað yvirhøvur er loyvt eftir fyrisitingarlógini at fólk ikki fáa svar. Um tað ikki bar til at viðgera umsóknina, kundu umsøkjarar fingið eina váttan um at umsóknin er móttikin og eina frágreiðing um, nær tey kunnu vænta, at hon verður viðgjørd.

Málið um Natashu Vukotic er so aftur eitt dømi um ómetaliga vánaliga fyrisiting.

– Tað nyttar ikki at skylda uppá at hetta er eitt danskt málsøki, tí vit skulu eisini viðgera umsóknirnar og tað er okkara partur sum víkur ferð eftir ferð.

John Johannessen sigur, at føroyskir myndugleikar skulu bara gera sítt tilmæli til danska udlændingestyrelsen at taka støðu til.

Hóast hetta tilmæli bara er ein lítil partur av samlaðu viðgerðini, tekur tað so langa tíð at avgreiða málini, at eg ivist í um eg yvirhøvur hevði torað at yvirtikið alt málsøkið, soleiðis sum tað nú verður fyrisitið.

## Kann ikki verða koyrd av landinum

Ì hesum føri er talan um Natashu Vukotic, sum hevur búð og virkað í Føroyum í seks ár uttan slit og sum er 100% integrerað í føroyska samfelagnum. Er tað rætt at koyra slíkt fólk av landinum aftur?

– Tað kunnu vit ikki gera. Eg haldi ikki, at vit kunnu koyra fólk avfutur landinum, sum hava verið her so leingi og sum fegin vilja vera føroyingar. Eg eri samdur í, at sum støðan er, eiga vit at ansa eftir, hvussu nógvar útlendingar afturat vit taka inn í landið. Men teir útlendingar, sum longu eru her og sum gera alt fyri at kunna verða føroyingar, eiga at sleppa at verða verandi.



*– Føroyingar skulu vera glaðir fyri at vit ikki fáa somu viðferð uttanlands, sum vit geva útlendindingum í Føroyum, heldur John Johannessen, tingmaður*

Tí væntar John Johannessen heldur ikki, at hon og dótturin verður send av landinum.

Hann vísir á, at er tað nakar, sum hevur havt brúk fyri vælvild og virðiligari viðferð, eru tað nettupp føroyingar, tí føroyingar arbeiða uttanlands í hópatali.

– Ikki minst fóru túsundtals føroyingar uttanlands at arbeiða í kreppuárunum og tað hevði mangan verið synd í teimum, høvdu teir fingið somu viðferð frá myndugleikunum, sum útlendingar í Føroyum fáa frá okkara myndugleikum, sigur John Johannessen.